# Bil- og Maskinverkstaðurin á Sandi




*Karl Vidtfelt er dagligur leiðari á Bil- & Maskinverkstaðnum á Sandi. Karl er eisini kendur innan føroyska fótbóltsheimin*

**Bil- og Maskinverkstaðurin á Sandi varð stovnaður í 1970. Í 1996 yvirtóku brøðurnir Rólant og Karl Vidtfeldt fyritøkuna, sum umframt at vera ein Statoilstøð, m.a. hevur mjólkarbil og bussar**

FYRITØKA
*Magnus Gunnarsson*

Bil- & Maskinverkstaðurin á Sandi varð stovnaður í 1970 av Ásmundi Johannesen. At byrja við var talan um ein verkstað, men miðskeiðis í 70-unum fingu teir Esso olju og bensinpumpur. Umframt at umvæla bilar og maskinur hava teir øll árini eisini arbeitt nógv umborð á bátum og skipum. Landbúnaðarmaskinur eru ein partur av teirra virksemi, og umboðað teir New Holland traktorar, ið er ein samstarv millum Ford og Fiat. Eisini hava teir mjólkarflutningin fyri MBM í Sandoynni, í Hesti og í Suðurstreymoynni. Í 1996 yvirtóku brøðurnir Rólant og Karl Vidtfeldt fyritøkuna. Karl kom har sum ørindadrongur í 1970 og lærdi til bilmekanikara frá 1973-77. Síðan hevur hann arbeitt í fyritøkuni. Umframt mjólkarbilar røkja teir eisini busskoyring fyri Bygdaleiðir og eru partaeigarar í Sp/f Bil Sandoy. Á Bil- & Maskinverkstaðnum gera teir eisini eftirlit av øllum bilmerkjum. Í dag arbeiða 12-15 fólk í fyritøkuni, ið eisini er ein nútímans Statoilstøð.



Til lukku!

*Føroya Banki ynskir kvinnunum hjá ÍF til lukku við føroyameistaraheitinum í meistaradeildini.*

FØROYA BANKI



**BMW 320 CI**
árg. Aug.2001
km.19.000
Til sølu um hóskandi boð fæst
Nýprísur: kr. 365.000
17 dekk á alu-felgum fylgja við
*Tel. 211208*



MPV TIL SØLU
Nissan Prairie árg 94 TÝSKUR bilur, svartur, bakhurðar langsgangand, sportfelgur sóltak
2 sett dekk, sóltak, elrútar og sentrallás
SKAL SIGGJAST EINANS
Kr. 110.000 KR VMVG
TLF. 224910

Bilar

Nr. 55 • hósdagur • 20. mars 2003 • 77. árg.

## Opið leygardagin

Leygardagin 22. mars frá kl. 10-14 verður opið á Bilasøluni hjá Øssur Johannesen í Hoyvík. Umframt Seat Cordoba sýna teir eisini "kampagnumodellið" VW Golf DK fram. Golf DK eru væl útgjørdir við m.a. aircondition, sportratti leður girknøtti, kopphaldarum aftan og framman og kromringum um instrumentini á instrumentborðinim. Hurðahandtøkini og síðulistarnir hava sama lit sum bilurin.

# Seat Cordoba – største viðførisrúmið í sínum klassa

**Seat Cordoba, ið júst nú er komin á føroyska og danska marknaðin, er í veruleikanum ein Seat Ibiza sedan við stórum viðførisrúmi. Í dag eru sponsku Seat bilarnir VW bilar við sjálvstøðugum modellum og búmerkjum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*




*Seat Cordoba er sami bilur sum Seat Ibiza, við størri akslafrástøðu og viðførisrúmi*

Sponsku Seat bilarnir eru ætlaðir sum sportligar útgávur av tilsvarandi VW bilum. Við tað at VW konsernin eigur Seat verksmiðjuna, er talan um VW bilar við sjálvstøðugum modellum og búmerkjum. Eins og Seat Ibiza hevur Cordoba eina framkomna undirvognsskipan, ið gevur bilinum sportligar koyrieginleikar og fast vegtak. Elektrohydrauliska servostýringin gevur bilinum eina sera stútta og beinleiðis stýring. Sama er galdandi innan, har setrini og instrumentborðið eisini eru í sportligum stíli.

Lasersveisingarnar av heilgalvaniseraða karossaríinum gera sítt til, at bilurin virkar stabilur at koyra, og samlikvaliteturin er í topp. Innan tekniska menningina er Cordoba ein sera framkomin bilur. Plássið innan er tað sama sum í Ibiza, men Cordoba hevur eitt viðførisrúm upp á heilar 485 litrar, ið størri enn vanligt fyri bilar í hesum klassanum, men hann er eisini 33 cm longri enn Ibiza.

### Minnir um Alfa

Bilurin er væl ljóðdoyvdur og lítið hoyrist til motorin inni í kabinuni. Tað at Cordoba minnir um italsku Alfa Romeo, kemur av at kendi bildesignarin, Walter de Silva, sum t.d. teknaði Alfa 156, seinastu trý árini hevur starvast hjá Seat.

Cordoba fæst við trimum bensinmotorum frá 64 til 100 hk og trimum dieselmotorum frá 64 til 130 hk. Talan er um ein væl útgjørdan bil við t.d. ABS bremsuskipan við elektroniskum bremsukraftdeilara, airbag framman og í síðunum, fjarstýrt sentrallás, elsíðurútum framman, elsíðuspeglum við hita, rattið kann stilast allar vegir, hita í sprinklaradysunum, forlyktavaskarar og hita í forsetrunum.



*Innan er alt í sportsligum stíli*







*Cordoba fæst við trimum bensin og trimum dieselmotorum*

SEAT

## Seat Cordoba 1,4 16V

| | |
|---|---|
| Motorurin: | 1.4 litur 4 syl. bensin 101 hk |
| 0-100 km/t: | 11,5 sek |
| Bensinnýtsla: | 15,2 km/l |
| Dekkstødd: | 195/55-15 |
| Stødd og vekt: | |
| Longd: | 428,0 cm |
| Breidd: | 170,0 cm |
| Hædd: | 144,0 cm |
| Eginvekt: | 1075 kg |
| Viðførisrúm: | 485 litrar |
| Prísur: | kr. 152.000. metallakk + (3.000) |
| Søluumboð: | Bilasølan v.Øssur Johannesen<br>Vegurin Langi<br>FO-110 Tórshavn<br>Tel. 315354<br>www.audi-vw.net |